# Sosialurin

Nr. 175 • týsdagur • 12. september 2006 • 80. árgangur • Kr. 13,00

www.sosialurin.fo


Nú er tað váttað:

## Johan skal gera NSÍ til meistarar



ítróttur 23-26



Útbúgvingin er í vanda:

## Halda okkum fyri tað turra spott

Ítr 23-26



## Alma Frederiksen í Miðvági 100 ár

Síða 6-7



Útimissiónsstevnan:

## Panelorðaskifti um missión

Síða 16




Meðan bíðað verður eftir oljuni:

# Breti kortleggur upphav Føroya

**Ungi bretski jarðfrøðingurin Simon Passey kortleggur føroysku undirgrundina heilt av nýggjum. Í fótafetum Jóannes Rasmussen, sála er hann í samtarvi við Jarðfeingi í ferð við at geva út nýggja bók um upphav Føroya. Hetta hendir samtíðis sum borurin á landgrunninum melur við fullari ferð. Keldur vilja vera við, at boringin sær áhugaverd út**

Síða 17-20


POSTKASSAR



Stórt úrval

Heiðavegur · 600 Saltangará · Tel 44 75 60
Fax 44 84 60 · www.klementpetersen.fo

pf Klement Petersen

Vit hava lyftir til øll endamál

Sjálvkoyrandi 4WD diesel lyftir røkka 18 metur

Trailaralyftir røkka 15 metur

Sax-lyftir røkka 12 metur



Kaj Andreasen & Co

BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK · TEL 31 56 00

Umvæla allar bilskaðar og mangt annað



Sp/f Plátuverkstaðið
v/ Glenn Perdomo
Tel 321778 ella 221778
www.plv.fo

Í fótafetum Jóannes Rasmussens:

# Breti kortleggur upphav Føroya

FØROYA JARÐFRØÐI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Millum mongu fólkini á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í hesum døgum er eisini bretin Simon Passey, og ørindi hansara eiga at hava serstakan áhuga fyri allar føroyingar. Hansara uppgáva hevur hesi seinastu árini verið at fylgja upp arbeiðinum hjá okkara egna jarðfrøðingi, Jóannesi Rasmussen, sála, sum halgaði alt sítt lív til at kanna og kunna um upphav okkara, nær og hvussu Føroyar eru vornar til.

Nógv nýggj vitan er komin til vega, síðani Jóannes Rasmussen skrivaði stórverk sítt og sum hevur innivist í hvørjum tí einasta føroyska heimi. Og tað er hesa vitan, sum Simon Passey hevur savnað saman, og í góðum samstarvi við serfrøðingar innan jarðfrøði í útlandinum, hevur hann so sett út í kortið av nýggjum. Simon fer á oljuráðstevnuni at hitta starvsfelagar og lurta eftir mongu áhugaverdu fyrilestrunum, sum m.a. fara at snúgva seg um upphav Føroya so ella so. Ætlanin er at geva út eina nýggja bók um Føroya jarðfrøði vónandi í komandi ári. Bretski jarðfrøðingurin starvast dagliga á Jarðfeingi, har hann hevur fingið litið upp í hendi sera stóru men eisini spennandi uppgávuna at fylgja upp ella uppgradera vitan okkara um okkara egna land og uppruna tess.

Í sambandi við oljuráðstevnuna verður eisini upplýst, at næsta heyst frá 29. Til 30. august verður stór ráðstevna til minnist um Jóannes Rasmussen, sála við heitinum "Jóannes Rasmussen Conference: Evolution of basaltic Provinces" Jóannes Rasmussen er faðin at føroysku jarðfrøðivísindini og var fyrsti føroyingur sum fekk útbúgving sum jarðfrøðingur frá lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Saman við lærara sínum Arne Noe-Nygaard, professara kortlegði hann stóran part av føroysku undirgrundini. Mest kendur er hann fyri bók sína "Øldir og Upphav", sum hann eisini fekk M. A. Jacobsen virðislønina fyri. Hann var eisini upphavsmaðurin til føroysku stovnarnar, sum tóku sær av jarðfrøðini. Nú hava tey á Jarðfeingi so sett út í kortið av nýggjum og vilja við hesum fyrstu ráðstevnuni av sínum slag verða við til at heiðra minni um henda eina av okkara frægastu vísindamonnum.



*Simon Passey í heimligum umhvørvi, her stæddur á Føroya Náttúrugripasavni, har framsýning er av upphavi Føroya*
*Mynd Jan Müller*



*Regin Hammer, føroyski umboðsmaðurin hjá DONG uttan fyri snotuligu hølini á Kongabrúnni*
*Mynd Jan Müller*

# Danska DONG á Kongabrúnni

OLJUBÚSTAÐUR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Danska oljufelagið DONG hevur nú fingið nýggjan bústað og er adressan einki minni enn Kongabrúgvin í Havn. Felagið, sum áður var í samtaki við Amerada Hess og helt til aðrastaðni í býnum, skal nú halda til í snotuliga hvíta bygninginum hjá Marstein, har Villejus fyrr helt til. Umframt Dong halda trý onnur oljufeløg til í bygninginum. Fyrst og fremst Atlantic Petroleum og harnæst Amerada Hess og Geysir. Í sambandi við at stór oljuráðstevna verður hildin í Norðurlandahúsinum í hesum døgum varð skipað fyri móttøku í nýggju hølunum. Dong er eitt av teimum mest virknu oljufeløgunum á Atlantsmótinum. Felagið er m.a. við í oljuboringini á Brugduleiðini úti á landgrunninum. Ikki færri enn sjey umboð fyri Dong eru við á oljuráðstevnuni teirra millum tvey av oddafólkunum, Søren Gath Hansen og Jan Terje Edvardsen. Føroyskur umboðsmaður hjá felagnum er Regin Hammer, sum eitt skifti arbeiddi hjá Dong í Hørsholm uttanfyri Keypmannahavn.

# Nils Sørensen formaður í FOÍB


*Nils Sørensen, nýggi formaðurin í FOÍB her saman við umboðum fyri fleiri oljufeløg uttanfyri hølini hjá ikki færri enn fýra oljufeløgum*
*Mynd Jan Müller*

Áhugafelagið hjá oljufeløgunum, sum leita eftir olju á føroyska landgrunninum, FOÍB, Føroya Oljuídnaðar Bólkur, valdi á fundi í gjár nýggjan formann eftir Ben Arabo, sum herfyri flutti til London at arbeiða á høvuðsstøðini hjá amerikanska oljufelagnum Amerada Hess. Nýggi formaður er stjórin í Faroe Petroleum, Nils Sørensen. Hann skal standa á odda fyri áhugafelagnum hjá teimum 13 oljufeløgunum, sum eru virkin á føroyska landgrunninum. Felagið skal tryggja áhugamálini hjá oljufeløgunum, soleiðis at tey standa sterkari yvir fyri almenninginum og myndugleikunum, hava tey nøkur ynski. Eisini skal felagið vera við til at kunna um teirra virksemi.

Bjarni Djurholm setti oljuráðstevnu:

# Bjóðar oljufeløgunum nýggj leitiøki á landgrunninum




**Nógva virksemið og stóri áhugin fyri oljuleiting eitt nú við Føroyar hevur fingið landsstýrismannin í oljumálum at skunda undir útbjóðing av nýggjum leitiøkjum á landgrunninum. Jarðfrøðingar sita tí í løtuni og kanna, hvørji øki kunnu vera áhugaverd at bora í komandi árini**

OLJURÁÐSTEVNA

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað var landsstýrismaðurin í oljumálum, sum setti oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í morgun. Bjarni Djurholm. Hann fegnaðist um stóra áhugan fyri føroysku undirgrundini og vísti á, at tá áhugin fyri oljuleiting tók seg upp fyrst 90-unum, varð jarðfrøði ikki tað fakið, sum stóð ovast á ynskilistanum hjá føroyskum studentum. Men hetta er nú broytt. –Eg eri tí fegin um at síggja, at eitt vaksandi tal av studentum velja hesa leiðina, og tí gleddi tað meg eisini at síggja, at fyrireikararnir av ráðstevnuni hava givið føroyskum jarðfrøðislesandi oø. Møguleika at hitta umboð fyri oljuvinnuna, teirra møguligu arbeiðsgevarum. Klokkan 17 verður nevniliga slíkt høvi hjá studentum.

Landsstýrismaðurin fekk alt oljufólkið at halda ondini, tá hann kom inn á boringina hjá Stena Don á landgrunninum. Men her var hvørki dukkufretur ella nøkur bumba slept. Hann segði, at boringin heldur fram, men tað fer at ganga ein mánaði ella so, áðrenn boringin er liðug og man kann kunngera úrslitið.

Landsstýrismaðurin vísti síðani á brunnin, ið BP sum fyristøðufelag fer at bora í 2007. Somuleiðis hevur ENI boða frá, at tað fer at bora í 2008. Aftrat hesum verða fleiri brunnar boraði í bretska partinum av Atlantsmótinum og alt hetta virksemið ger, at Føroyar gerast alt sjónligari á oljukortinum.

Hesin vaksandi áhugi og virksemið hevur gjørt, at landsstýrismaðurin hevur heitt á Jarðfeingi um at fyrireika 3. Loyvisrunduna á landgrunninum. Hon verður latin upp næsta heyst. Fyrstu fyrireikingarnar eru longu í gongd og hyggja jarðfrøðingar í løtuni eftir áhugaverdum økjum at bjóða út. Útbjóðing fer eisini at fevna um øki, sum fyrr hava verið bjóðað út.

Bjarni Djurholm helt fyri, at ein nýggj útbjóðing gevur eisini myndugleikunum møguleika fyri at enduskoða treytir og reglur og skipanina sum heild. – Eg sigi ikki, at tað fara at verða gjørdar stórar broytingar, men allar skipanir eiga at verða endavendar og evalueraðar sohvørt. Í hesum sambandi fara loyvishavarar sjálvandi at verða tiknir við uppá ráð. Vit síggja fegnir, at loyvishavarar gerast virknir luttakarar og partnarar.

Landsstýrismaðurin minti eisini á týdningin at leitingin í føroyskum øki skal hava sítt støði í Føroyum – frá tí at oljufeløgini skulu hava fastan bústað her eins og tey tryggja, at føroysk luttøka er partur av virkseminum.









**Starvsfólk aftaná skúlatíð til Baresso Coffee**

**SMS letur upp nýggja Baresso café 25. oktober, og í tí samband søkja vit álítandi fólk til caféina. Gongur tú í skúla, hevur tú møguleika at søkja um arbeiði hjá okkum. Starvið verður sett frá 18. oktober 2006.**

**Arbeiðsuppgávur: At gera reint og rudda har gestirnir sita • At tryggja at uppgávur viðvíkjandi reingerð og annað, sum er neyðugt, verður gjørt • At gera kaffistovuna reina eftir afturlatingartíð og annars gera klárt til dagin eftir • Tilgerð og borðreiðing av okkara sermerktu kaffisløgum, køkum, tvíflísum og øðrum matvørum • Geva gestum góðar upplivingar við einum smíli.**

**Vit vænta av tær : At tú ert ágrýtin • Tú dugir at halda kaffistovuna reina og nossliga, tí hetta hevur stóran týdning fyri, at okkara gestir føla seg væl • Tú hevur eitt vinnandi smíl og ert í góðum hýri, so onnur gleðast við tær • Tú dugir væl at samstarva • Tær dámar at gleða onnur við tínum ágrýtni. Hevur tú spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, kanst tú ringja til Anju á tel 210990.**

baresso COFFEE

SEND UMSÓKN TIL : BARESSO • SMS • Á TRAPPUTRØÐNI • POSTBOKS 1059 • 110 TÓRSHAVN


Bjarni Djurholm setir oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum
Mynd Jens K Vang.


Nógvir útlendskir granskarar og oljufólk hava leitað sær til Føroya at vera við á ráðstevnu um oljuleiting um okkara leiðir
Mynd Jens K Vang



Boringin á landgrunninum:

# Sær áhugavert út

**Borað verður framvegis niður í myrku undirgrundina á Brugduleiðini. Eingin vil siga nakað, men okkurt bendir á, at tað sær áhugavert út sum ein kelda málber seg.**

BRUGDUBRUNNURIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað var ein ikki serliga tíðindafróður landsstýrismaður í oljumálum, sum setti oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum fyrrapartin. Hann segði, at vit mugu brynja okkum við toli. Borað verður við fullari ferð og um ein mánað ella so fyriliggur okkurt úrslit. Tey, ið standa fyri boringini, vilja heldur einki siga í løtuni. Sosialurin hevur tó skilt, at støðan í løtuni kann lýsast við orðinum ”Áhugavert”. Eftir øllum at døma síggja løgini undir basaltinum áhugaverd út soleiðis at skilja, at vónirnar til at jarðfrøðiligu fortreytirnar fyri at olja kann goyma seg har, enn eru til steðar. Men hetta sigur so einki um, at olja finst, tó at tað altíð er ein stórur lætti at fáa tekin um, at mongu fortreytirnar fyri kolvetni eru til steðar.

Sum skilst er tað eisini komið eitt sindur óvart á serfrøðingarnar, at basaltið hevur verið væl tjúkri enn mett. Upprunaliga varð metingin tann, at basaltið var einar 1000 til 1200 metrar tjúkt. Helst er tað meira enn 2000 metrar til tjúkdar. Men hetta nýtist ikki at vera nakað minus, nú tað hevur víst seg at ganga munandi betri at bora gjøgnum basalt enn higartil hildið. Spurningurin er so, hvat er undir basaltinum, og tað er her, at bæði oljufeløg og myndugleikar halda kortini tætt til sín. Kann vera at ymiskt sær áhugavert út men at tað er ov tíðliga at siga nakað við vissu enn. Komandi dagarnir ella vikurnar fara at geva okkum neyvari svar. Annars vil tað altíð vera ringt at gita, hvussu sær út í undirgrundini í einum váðiligum øki sum tí føroyska, har tað ikki er borað áður. Ein sokallaður ”Wild Cat” brunnur sum Brugdan vil altíð hava við sær óvantað viðurskifti.

Ringastu tíðindini vilja vera, at man ikki er komin gjøgnum basaltið, og um eingi sediment eru undir basaltinum. Okkurt bendir sum sagt á, at møguliga er borað gjøgnum basaltið. Vit fáa tó ikki hesi tíðindi váttað.

Sambart fyrilestrunum á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í morgun, halda serfrøðingar, at møguleikar eru fyri at finna sediment undir basaltinum av sama slag, sum eru funnin í Eysturgrønlandi. Ein staðfesting av hesum vilja vera góð tíðindini fyri øll, sum hava vónir til at finna kolvetni í føroysku undirgrundini. Jarðfrøðiliga søgan sigur okkum, at einaferð vóru Føroyar og Grønland grannar og við tíðini hevur Grønland flutt seg longur vestureftir.


Frá oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í morgun




## Starvsfólk hjá Baresso Coffee

SMS letur upp nýggja Baresso café 25. oktober, og í tí samband søkja vit álítandi fólk til caféina. Øll yvir 18 ár hava møguleika at søkja um arbeiði, fulla tíð ella hálva tíð. Starvið verður sett frá 1. oktober 2006.

Arbeiðsuppgávur: Tilgerð og borðreiðing av øllum Baresso Coffee special kaffi- og te-úrvali • Geva gestum góðar upplivingar við einum smíli, vísa søluhegni og ein hugburð, sum vinnur frama • Stuðla leiðara/varaleiðara og restini av arbeiðsliðnum • Javna reingerðing og upprudding av gestaøkinum og øllum øðrum økjum í kaffistovuni.

Væntanir til tín sum starvsfólk: Tú arbeiðir við brennandi huga, førleika og einum jaligum hugburði fyri at røkka virðunum hjá Baresso • Gleðin við at gleða onnur og geva okkara gestum stórfingnar upplivingar er týðandi partur av tínum arbeiði • Tú dugir væl at samstarva og ert ein týðandi partur av arbeiðsliðnum. Hevur tú spurningar viðvíkjandi arbeiðinum, kanst tú ringja til Anju á tel 210990.

baresso COFFEE

SEND UMSÓKN TIL : BARESSO • SMS • Á TRAPPUTRØÐNI • POSTBOKS 1059 • 110 TÓRSHAVN

# Góður hýrur tá Faroe Petroleum læt upp skrivstovu í Stavanger



*Uttanfyri skrivstovuna, Nils Sørensen, Graham Stewart, Meinhard Jacobsen, Helge Hammer og Joe Darby*

**Við sangi og spæli rúnarbant Kjell Inge Torgersen tey, sum komin vóru til móttøkuna, tá ið Faroe Petroleum læt upp skrivstovu í Stavanger nú um dagarnar. Hann sang um svarta gullið, sum goymir seg undir havbotninum. Almenna upplatingin var ein inniligur og góður karmur um byrjanina hjá Faroe Petroleum í Stavanger og Noregi**



*Borgarstjórin í Stavanger, Leif J. Sevland, stýrisformaðurin hjá Faroe Petroleum, Joe Dadby og skrivarin í felagnum Julian Riddich.*



*Millum gestirnar var eisini Olaf Olsen*



*Helge Hammer, stjóri hjá Faroe Petroleum í Noregi*

**STAVANGER**
*Ole Jacob Eide – Raude Media*
*Týtt til føroyskt: Petur Meinhard Magnussen, í starvsvenjing*

Øll leiðslan í felagnum og nógvir gestir vóru hjástaddir í Øvre Strandgate 124, tá ið Faroe Petroleum alment legði lunnar undir sína skrivstovu í Noregi. Oljufelagið er ungt, og høvuðssætið liggur í Aberdeen. Felagið miðjar eftir at útvinna olju við Føroyar og Hetland men eisini í norskum øki.

Í Noregi stendur felagið fyri stórum avbjóðingum á einum trýstum arbeiðsmarknaði, men tað er týðiligt, at felagið trýr upp á virksemið í Noregi.

Faroe Petroleum hevur sett seg niður í Gamla Stavanger, sum norðmenn rópa hendan býarpartin.

Fyri at staðfesta sítt føroyska tilknýti, hevur felagið latið listamannin, Helga Joensen, pynta nýggju skrivstovuhølini. Helgi hevur sín uppruna í Føroyum, men hevur í fleiri ár búð í Stavanger.

Ein fegin norskur stjóri, Helgi Hammer, beyð vælkomin við almennu upplatingina av skrivstovuni. Hann vísti á flagg-symbolikkin við føroyska, skotska og norska flagginum, sum felagið hevur í hølunum. Skemtandi segði hann, at fólkið á oyggjunum vesturi í havinum – Føroyum – eru fólk, sum rýmdu undan skatti í Hardanger í Noregi.

Í síni røðu legði Helgi Hammer dent á góða sambandið millum tey trý londini og býirnar, Tórshavn, Aberdeen og Stavanger.

Helgi Hammer hevði eisini bjóðað borgarstjóranum, Leif Johan Sevland, til almennu upplatingina.

Leif ynskti tillukku við skrivstovuni og segði, at Stavanger er miðpunktið fyri slíkum virksemi. Hann segði, at í Stavanger eru tey fegin um, at eitt nýtt og týdningarmikið felag aftrat hevur sett seg niður í býnum. Borgarstjórin segði, at hetta eru spennandi tíðir fyri Faroe Petroleum og Føroyar, nú Statoil í hesum døgum borar í føroyskum øki. Hann lovaði at gera sítt til, at Faroe Petroleum fær eina góða byrjan í Noregi, men helt ikki, at hann kundi geva felagnum lyfti um verkfrøðingar, tí norski arbeiðsmarknaðurin er so "heitur" í løtuni. Hann helt tó, at Stavanger er eitt gott val hjá Faroe Petroleum. Við móttøkuna handaði Leif Johan Sevland felagnum ein málning, sum listamaðurin, Kjell Pahr Iversen, hevur málað.

Stýrisformaðurin í Faroe Petroleum, Joe Darby, helt, at Noreg avgjørt er besta landið hjá einum oljufelag at seta seg niður í. Hann helt, at felagið hevur møguleikar at menna seg við nýggju skrivstovuni.

Kjell Inge Torgersen setti punktum fyri móttøkuni við góðum og inniligum sangi og tónleiki. Hann sang um svarta gullið, sum goymir seg í havbotninum, og hann rúnarbant fólk við orðum sum "Og tidevatn, går opp og ned, uendeleg, i all slags vær.." – eitt ørindi, sum fólk úr Føroyum, Skotlandi og Noregi kenna seg aftur í.